

SADISTISKT

*Tað er óskiljandi, at fólk fáa seg til at pína djór við fríum vilja, heldur Rúni Nielsen, næstformaður í Djóraverndarfelagnum, sum eisini er djóravinur og her situr saman við sínum risastóra Sankta Bernhardshundi, ið ber navni Tuffi*

# TEY SKULDU SKAMMAÐ SEG

**DJÓRAPÍNSLA** Tey dømi, vit hava sæð um djórapínslu í Føroyum í seinastuni, eru á markinum til tað sadistiska, heldur Rúni Nielsen, næstformaður í Djóraverndarfelagnum

Áki Bertholdsen

– Hasi fólkini skuldu skammað seg!

Rúni Nielsen, næstformaður í Djóraverndarfelagnum, er ikki í iva um, hvat hann skal halda um tey ótespuligu dømini, vit hava sæð í Føroyum í seinastuni um djórapínslu.

Mitt í lembing læt ein bóndi í Suðuroy eitt lamb ganga á trimum beinum eftir at tað var yvirkoyrt og hevði meiðslað annað frambeinið so illa, at hann bara skar tað heilt av.

Og nú um viskuskiftið hevur onkur verið inni á eina trøð í Porkeri og skorið høvdið av einum lambi.

**» Øll dýr hava krav upp á eitt virðiligt lív – og ein virðiligan deyða**

- Djórapínsla av hesum slagnum er á markinum til tað sadistiska, staðfestir næstformaðurin í Djóraverndarfelagnum.

### Óskiljandi

Hann sigur, at so grov djórapínsla er tíverri ikki nakað eindømi, tó at tað ikki kemur oftani fyri.

Tað, sum órógvar hann mest, er, at djórapínsla av hesum slagnum er framd við fríum vilja.

- Hetta er djórapínsla, har djór aktivt verða pínd við fríum vilja og tað er óskiljandi, leggur hann afturat.

Hann sigur, at vanligastu dømini um djórapínsla er annars óbeinleiðis djórapínsla, ella passiv djórapínsla, har djór eru fyri píning av tí at fólk ikki vita betri ella av tí at tey halda, at soleiðis eigur tað at vera.

- Tað hava eisini verið dømi, har djór eru pínd við vilja, men tað plagdi sum oftast vera óvitar, sum ikki hava vitað, hvat teir hava gjørt, tá ið teir hava bundið okkurt í halan á eini kettu ella okkurt líknandi.

Men næstformaðurin í Djóraverndarfelagnum heldur, at haðani frá og so til at skera likamslutir og høvd av djórum er eitt langt lop, tí tey dømini, vit hava sæð í seinastu, eru ráari djórapínsla, enn vit tíbetur eru von við.

*aki@sosialurin.fo*

# Høpisleyst at seta havnarfólk upp ímóti bygdarfólki

**DJÓRAPÍNSLA** Tað er heilt burturvið at gera djórapínslu til ein samanbrest ímillum føroyska bygdamentan og havnarfólk, sum onki hava skilt av nøkrum, heldur Rúni Nielsen í Djóraverndarfelagnum

Áki Bertholdsen

- Djórapínsla hevur onki við gamla føroyska mentan at gera. Tað hevur heldur onki við tað at gera, at havnarfólk ikki skilja bygdarfólk.

Tað staðfestir Rúni Nielsen, næstformaður í Djóraverndarfelagnum.

Fyri kortum var eitt mál nógv umrøtt, har ein bóndi hevði tikið beinið á einum smálambi, sum var yvirkoyrt.

Tá hevði bóndin hug at bagatellisera málið og í sjónvarpinum gjørdi hann tað til ein samanbrest ímillum gamla, føroyska bygdarmentan og fólkini á bonaðu gólvunum í Havn, ið hava mist sambandi við gamla, føroyska mentan.

Men hetta er eitt sjónarmið, sum næstformaðurin í Djóraverndarfelagnum afturvísur upp á tað harðasta.

- Tað er í fínasta lagi, at fólk drepa djór til matna. Tí hevur djóraverndarfelagið ongantíð talað at hvørki haruveiði, slakti og grindadrápi, tí tá ið vit búgva í Føroyum, er tað ein partur av lívinum, at dýr verða dripin til matna.

**» Dýrapínsla av hesum slagnum er á markinum til tað sadistiska**

- Men øll hava krav upp á eitt virðiligt lív – og ein virðiligan deyða, bæði menniskju og dýr, sigur hann.

### Sláa upp í glens

Hann sigur tí, at ein stór avbjóðing hjá teimum í Djóraverndarfelagnum er at fáa fólk at broyta hugburð til dýr.

Hann staðfestir eisini, at tað eru ikki so nógv havnarfólk limur Djóraverndarfelagnum. Og nógv av teimum havnarfólkum, sum eru limir í felagnum, eru nettupp bøndur og onnur, sum eru von við djórahald.

- Hinvegin eru flestu av limunum í Djóraverndarfelagnum, bygdarfólk um ein háls, sum eisini eru von við at hava dýr og sum eru von við at drepa djór til matna.

- Tað eru nógv, sum tíverri bara sláa djórapínslu upp í glens, og siga, at hatta eru bara havnarfólk, sum bara kunnu fara í køldiskarnar í handlinum eftir kjøti og sum hava mist sambandi við gamla, føroyska mentan.

- Í veruleikanum er hetta tað sama sum at siga, at bygdarfólk hava onga virðin fyri djórum og tað góðtaki eg ikki.

Rúni Nielsen sigur, at Djóraverndarfelagið er altso ikki bara fyri býarfólk við ektaðum, nýgreiddum rasuhundum. Tvørturímóti er ein grund til at fólk vilja vera limur í Djóraverndarfelagnum, at tey halda, at dýr hava krav upp á virðing, eisini tá ið tey verða dripin, sigur hann.

*aki@sosialurin.fo*